

## Rakar veiku næmingarnar

- Tað er ein vanlukka, um stuðulin til veikar næmingar verður skerdur komandi skúlaár. Hetta fer at raka bæði veikar og sterkar næmingar, sigur Magnus Tausen (myndin), formaður í Føroya Lærarafelag sambært uf.fo. Komandi skúlaár hava umleið 60 næmingar fleiri tørv á stuðli. Mentamálaráðið hevur skert tímatalið til næmingar við serligum tørvi við 20 prosentum, tí Sernámsdepilin hevur brúkt ov nógvar tímar higartil í ár. Tað merkir, at bert 37 prosent av teimum tímunum, ið skúlarnir hava søkt um til næmingar við serligum tørvi, verða játtaðir.

## Túsund rakt av salmonellu

Millum 3 og 4000 danir hava hesa seinastu tíðina ligið í songini við fepuri og magapínu eftir at verða smittað av salmonellabakteri'uni, skrivar Politiken. – Vit mugu heilt aftur til 1993 at finna nakað sum líkist hesum. Hetta er eitt rættiliga høgt tal eftir donskum mátistokki, sigur yvirlæknin Kåre Mølbak frá Statens Serum Institut. Longu í februar vórðu fyrstu tilburðirnir skrásettir, men tað var kortini fyrst í mai mánaði at tølini fingu myndugleikarnar at reagere.

# Konmansmýra eitur nú BIRKILUND

**Nancy Bjørklund og Birthe Toftagarð, sum í 1965 stovnaðu vøggustovuna, vórðu í gjár uppkallaðar, tá Vøggustovan- og Barnagarðurin á Konmansmýru í Havn skifti navn til Birkilund**

BARNAGARÐUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tann fyrsta mars í 1983 lat vøggustovan upp í nýggjum hølum á Konmansmýru – og 1. juli sama árið lat nýggi barnagarðurin upp. Síðani tá hava báðir sjálvsognarstovnarnir itið Vøggustovan á Konmansmýru og Barnagarðurin á Konmansmýru. Talan hevur verið um tveir sjálvsognarstovnar.

Katrin Bjarnadóttir hevur seinastu 10 árini verið leiðari á Vøggustovuni, men tá Elsebeth Bolstad legði frá sær sum leiðari fyri Barnagarðin á Konmansmýru 1. mars í ár, varð gjørt av at leggja stovnarnar báðar saman, og er Katrin Bjarnadóttir nú leiðari á báðum stovnunum, sum nú hava skift navn til felags navnið ”Birkilund”.

Sjálvsognarstovnurin byrjaði sum vøggustova í Jekaragøtu yvir við Strond í Havn tann 18. oktober í 1965, og vóru tað tær báðar Nancy Bjørklund og Birthe Toftagarð, sála, sum byrjaðu vøggustovuna.

Í Sosialinum 21. august í 1965 sæst, at umsókn frá Nancy Bjørklund og Birthe Toftagarð um stuðul til ”Vøggustovuna yvir við Strond” er viðgjørd. Sagt verður, at málið hevur verið fyri í kassanevndini og síðani í sosialu nevnd, sum báðar hava givið sítt tilmæli treytað av, at roknskapur verður framlagdur og at umsøkjararnir eru førir fyri at skaffa lán upp til 50.000 krónur, sum kommunan veðheldur fyri.

Seinni skrivar Sosialurin um eina tilráðing frá sosialu nevnd býráðsins, at bræv er komið frá Nancy Bjørklund og Birthe Toftagarð viðvíkjandi vøggustouvni. Har verður sagt, at ”barnatilsýnið” hevur givið loyvi til at seta vøggustovu á stovn til 22 børn.

Blaðið skrivar:

”Til heystar koma menn upp frá hesum stovni, og verður vøggustovan tá viðurkend, fær hon so stats-stuðul. Kommunan eigur at rinda 30% av rakstrinum, ið eru settar til 90.000 krónur, t. v. s. 27.000 krónur, men tá gjaldið frá foreldrunum er 40.000 krónur, resta 23.000 krónur í og varð tí einmælt samtykt at hækka studningin fyri hetta árið til 3.500 krónur um mánaðin. Sagt varð frá, at inventar o. a. fór at kosta 50.000 krónur, og býráðið fekk óivað umsókn um stuðul til hetta...”

Eftir nøkur ár í Jekaragøtu flutti vøggustovan niðan á Lützenstrøð, til hon í 1983 at flutti í nýggj og tíðarhóskandi høli við Hoyvíksvegin í Havn – ella á Konmansmýru, sum eisini gjørdist navnið – til stovnurin kl 17 í gjár skifti navn til Birkilund.




*Katrin Bjarnadóttir, leiðari í Birkilund saman við synunum Bjarna og Dánjal*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*


## Skips- ella Maskinverkfrøðingur til Det Norske Veritas (DNV)

www.dnv.fo

Vit søkja eftir einum sýnsfólki til fast starv hjá Det Norske Veritas í Føroyum.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og fjølbroytt starv í einari altjóða fyritøku við nógvum ymiskum uppgávum innan skips klassifikatión og øðrum líknandi uppgávum.

Møguleiki er eisini fyri arbeiði uttanlands í styttri ella longri tíð

Vit søkja ein verkfrøðing, helst við royndum innan sjóvinnu ella skipsídnað. Vit kunnu eisini veita upplæring til nýliga útlærdan verkfrøðing.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann samskifta á enskum, føroyskum og donskum. Arbeitt verður eftir altjóða leiðsluskipanum, og tað mesta av arbeiðinum fer fram á framkomnum IT skipanum..

Skrivstova okkara liggur á Vestaru Bryggju í Tórshavn, og leggja vit stóran dent á, at røkja okkara viðskiftafólk á ein professionellan hátt.

**Vit leggja dent á:**

- Flexibilitet
- Samstarv
- Trivna
- Álit
- Støðuga menning.

Vit kunnu bjóða tær eina góða løn við pensión og trygging eftir Skandinaviskum leisti.

Hevur hetta tín áhuga so send okkum eina umsókn við CV.

**Til Andrass.Joensen@DNV.com ella til:**

**Det Norske Veritas, Vestara Bryggja, 5 Hædd, FO-100 Tórshavn.**

Tørvar tær fleiri upplýsingar, ber til at venda sær til Andrass Joensen, Deildarleiðara á tlf 213750. Les um okkum á www.dnv.fo ella www.dnv.com

**Umsóknar freist: 11. juli 2008**



**DNV is unique. With us, you are constantly given challenges in your area of expertise and the opportunity to make an impact beyond business.**

Det Norske Veritas (DNV) is a global provider of services for managing risk. Founded in 1864, DNV is an independent foundation with the purpose of safeguarding life, property and the environment. DNV offers a truly international environment, comprising 300 offices in 100 countries, with 8.000 employees.

MANAGING RISK DNV